

*Heima fær stovan hjá fráfarna borgarstjóranum eina kerliga hond, nú stundir aftur eru til heim og familjulív. Úr stovuni hevur Steinbjørn O. Jacobsen útsýni yvir vágna og býin, sum hann metir vera vakrasta bý í Føroyum.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*m. Eg gjørdi eitt gott val, og meðan eg*
*n fyri okkum. Fjølmiðlarnir hingu seg*
*nn, hevði valið kanska sæð eitt sindur*

arnar. Eg má siga, at tað er ein veldig avbjóðing at gerast borgarstjóri, serliga uttan eina leiðaraútbúgving, ásannar Steinbjørn O. Jacobsen.

Hevði tað latið seg gjørt, hevði hann latið øllum pening, sum lótu eina umsókn inn til býráðið. Men resursirnar eru sjálvsagt ikki óavmarkaðar.

- Vit valdu at raðfesta klaksvíkingar fremst. Soleiðis at peningaligur stuðul altíð varð latin borgarum úr kommununi fyrst og fremst. Eitt stórt arbeiðið er gjørt fyri at menna ítróttarlívið her norði, sigur hann.

Tað skal eingin ivi vera um, at fráfarni borgarstjórin í Klaksvíkar kommunu, bert ynskti tað besta fyri sín heimbý. Hann er ikki í iva um at Klaksvík er vakrasti býur í Føroyum. Hann hevur staðið á odda fyri kanska størstu íløgurnar, sum eru gjørdar fyri býin, men tað rakk ikki til eitt tíðarskeið afturat sum borgarstjóri fyri kommununa. Eitt, sum kortini harmar hann, nú hann er farin frá, er at tað ikki eydnaðist honum at fáa politiska undirtøku fyri orkuverkætlanini fyri kommununa.

- Vit gjørdu stórar íløgur í framtíðina. Norðhavnin kastar ikki av sær sum er, men uppá sikt fer hon at gera tað. Tað, sum eg eri keddur av, er tað ólidna arbeiðið, ið liggur eftir. Eitt samt býráð tók undir við hesum íløgum, men fortreytirnar broyttust skjótt, og eg havi goldið prísin.

## Ikki pláss fyri mær meir

Fyri Steinbjørn O. Jacobsen hevur borgarstjórastarvið einki við makt at gera. Í staðin sær hann starvið sum eina avbjóðing. Eina avbjóðing, hann hevur trivist væl við. Nú hann hevur avhendað sessin til annan borgarstjóra, umboðandi ein annan flokk, er hann spentur uppá at síggja hvussu leikur fer. Tað er eingin loyna, at Klaksvík ikki hevur bestu útlitini fyri framman, nú fíggjarkreppan ger um seg og størsta arbeiðsplássið í býnum noyddist at bukka undir.

- Er tað nakar býur, ið kennir til upp og niðurtúrar, er tað Klaksvík. Fíggjarlig kreppa rakar ofta fyrst í Klaksvík, tí vit eru so viðbrekin. Eg hugsi nógv um hesi fólkini, sum mistu sítt arbeiði, og sum í dag ikki hava nakað arbeiði at fara upp til. Og á ein hátt kenni eg meg at vera í sama báti. Sum at tað ikki er pláss fyri mær meir, sigur hann álvarsliga.

Hann trívist ikki við einki at gera. Øll borgarstjóraárini hevði hann nógv og drúgt samstarv við nevndarformenn og deildarleiðarar í býráðnum, og nógvar uppgávur fylgdu við borgarstjórastarvinum so sum brúðarvígslur, røður, móttøkur og so framvegis.

- Alt tað fari eg at sakna. Eg sakni at hava nógv fólk rundanum meg.

1. februar fer hann aftur í starv á Húsalánsgrunninum, og inntil tá, verður stovan umvæld.

- Eg fari at taka ein steðg frá politikkinum fyrst. Men eg ætli mær kortini at blanda meg, tá høvi býðst. Eitt havi eg so lært av borgarstjórastarvinum. Tú verður ikki valdur fyri tað tú gert, men fyri tað, tú lovar.